## Dómarin avgjørdi dystin

Franski venjarin hjá enska felagnum Arsenal heldur, at dómarin avgjørdi toppdystin millum Chelsea og Arsenal um vikuskiftið. Chelsea vann dystin 3-0, eftir at støðan var 2-0 í hálvleikinum. Stutt inn í seinna hálvleik skoraði Arsenal, men dómarin kolldømdi málið. - Hetta var tað, sum avgjørdi dystin. Sjálvur haldi eg ikki, at tað var ein røtt avgerð av dómaranum, sigur Arsene Wenger. Arsenal fekk ikki bóltin í málið aftur, og stutt fyri leiklok skoraði Chelsea triðja málið í dystinum.



## Benitez gott mót

Venjarin hjá Liverpool heldur, at tveir sigrar innan fáar dagar kann verða tað, sum fer at venda skeivu gongdini hjá hansara liði. Í farnu viku vann Liverpool í Champions League, og sunnudagin sigraðu teir reyðu í lokaldystinum ímóti Everton. - Hesir sigrarnir vóru týdningarmiklir, og teir eiga at seta okkum upp til restina av kappingarárinum, sigur Rafael Benitez við BBC. Liverpool er nú nummar 5 í Premier League, men tað eru heili 13 stig fram til Chelsea á fremsta plássinum.

# Albert Dam tók gamalt met

**Albert Dam vann ikki kappingina, tá tað kom til stykkis, men við innleiðandi úrslitinum setti hann nýtt føroyskt met, sum annars var 12 ára gamalt**




Jákup Mørk



Tórhallur Simonsen, Jógvan Magnus Andreasen og Jim S. Guttesen fegnast, nú teir Vágaskoti hava tikið øll trý fremstu plássini



Albert Dam skeyt nýtt føroyskt met, men megnaði ikki at koppa Jógvani Niclasen í finaluni. Kaj Johannesen fekk triðja pláss og var sterkastu av ungu vaksnu Compound skjúttunum

Í 1997 setti Schandorff Vang føroyskt met fyri 60 pílar á 18 metrum, men í gjár varð hetta met tikið, tá Albert Dam skeyt seg til 582 stig av 600 møguligum. Hetta hevur eisini við sær, at hann nú hevur skotið nóg væl til at fara við til innandura EM í Croatia í vár. Hetta hevur Jógvan Niclasen megnað fyri tíð síðan, so har verða helst tveir menn úr Føroyum, sum luttaka í Compoundbólkinum.

### Tapti finaluna

Hóast Albert Dam var í serflokki innleiðandi, so megnaði hann ikki at vinna sjálva kappingina.

Fyrstu dystirnar vann hann rímiliga lættliga, men í finaluni hitti Albert Jógvan Niclasen, sum leingi hevur verið sterkasti skjúttin í landinum.

Dysturin millum teir báðar endaði við, at Jógvan vann 115 ímóti 113 hjá Alberti av 120 møguligum stigum.

Í bronsudystinum í Compound hittust Kaj Johannesen og Magnus Andreassen, sum báðir eru ungir skjúttar og høvdu verið í umskjóting í hálvfinalunum ímóti Jógvani og Alberti, eftir at vanligu dystirnir endaðu javnir.

Sjálvur dysturin millum ungu menningar endaði javnur. 112-112, og so skuldi aftur umskjoting til.

Her var Kaj kaldari og megnaði at skjóta sín píl í miðjuna. Tað vil siga, at Kaj Johannesen vann triðja plássið, meðan Magnus mátti vera nøgdur við fjórða plássið.

### Heimasigur í recurve

Í recurve bólkinum vóru tveir skjúttar, ið tað var rokna við skuldu luttaka ikki við. Og tá Hans Petur Højgaard og Eirikur í Jákupsstovu skutu heilt óvanliga illa, bleiv skjótingin innleiðandi á einum støði, sum ikki hevur verið í longri tíð.

Bert ein skjútti megnaði at vera omanfyri 500 stig, og tað var Jógvan Magnus Andreasen, sum veruliga hevur fingið skil uppá sína skjóting og megnaði at fáa 539 stig.

Í finalunum broyttist myndin lítið frá tí hon var innleiðandi. Í hálvfinalunum skeyt Jógvan Magnus Andreasen ímóti Jim S. Guttesen og vann við góðari skjóting lættliga. Í hinari hálvfinaluni skutu Tórhallur Simonsen, sum var næstur innleiðandi, ímóti Eiriki í Jákupsstovu, sum lá á triðja plássi innleiðandi.

Tórhallur vann sannførandi, hóast skjótingin ikki var góð.

Tí hittust Jógvan Magnus Andreasen og Tórhallur Simonsen í finaluni. Jógvan Magnus vant burtur úr Tórhalli og vann við 35 stigum, sum er óvanliga nógv.

Hinvegin fegnaðust Vágamenn, tí Jim S. Guttesen, sum umframt Torhall og Jógvan Magnus er úr Vágum, vann á Eiriki í Jákupsstovu í bronsudystinum, og hetta hevði við sær, at Vágamenn áttu fyrsta, annað og triðja plássið í fyrstu kappingini á heimavølli á Giljanesi í ár.



Oddmar Nielsen og Odd Andreassen úr Ørvi eru sterkastu skjúttarnir hjá børnunum í løtuni. Ingi Alfredsson, sum eisini skjýtur í Runavík fekk triðja plássið

# Oddarnir fremstir av ungdóminum

**Í longri tíð hava Odd Andreassen og Oddmar Nielsen verið sterkastu skjúttarnir hjá teimum yngru. Aftur hesa ferð hittust teir báðir í finaluni**




Eirikur í Jákupsstovu

Innleiðandi vóru liðfelagarnir úr Ørvi fremstir, men Oddmar var munandi betur fyri hendan dagin. 535 stig fekk hann, og hóast hetta er minni enn bæði hann og Odd skjóta í venjing, so var Oddmar 45 stig frammanfyri liðfelagan innleiðandi.

Í til finaluskjótingina broyttist tó eitt vet, teir báðir úr Ørvi vundu burtur úr hinum skjúttunum, og Oddmar vann ein dyst ímóti finaluni við heili 52 stigum, sum má sigast vera heilt nógv, tá tað bert eru 120 stig at skjóta um.

Í bronsufinaluni skutu Marnar Mikkelsen úr Vágaskoti og Ingi Alfredsson úr Ørvi. Drongurin úr Ørvi vísti seg at raka dagin, og vann við seks stigum.

Í gulldystinum hittust teir báðir ungu Ørvadreingirnir. Odd var gjøgnum finaludystirnar komin fyri seg, og skeyt nú eins væl og hann ger til venjing. Dysturin gjørdist tí rættiliga javnur, og tá komið var á mál hevði Odd vunnið sær 109 stig, meðan Oddmar skeyt á sama støði sum innleiðandi og fekk 105 stig av 120 møguligum.

Tí vann Odd Andreassen kappingina, og á øðrum og triðja plássi endaður Oddmar og Ingi, sum eisini eru úr Ørvi.